# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**18. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan kl. 11.00:*** Heri Joensen
***Argja kirkja kl. 11.00:*** Bergur D. Joensen. Altargongd. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri KFUM-skótarnar
***Vestmanna kl. 11.00:*** Mogens Tilsted Christensen
***Sørvágur:*** kl. 11.00 David Johannesen
***Norðskála:*** kl. 11.40 Skriftamál, kl. 12.00 Messa, Emil Olsen
***Skála:*** kl. 11.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Fríðrikskirkjan kl. 11.00:*** Martin R. Jacobsen. Altargongd
***Klakksvíkar sjúkrahús kl. 10.00:*** Niels Pauli Danielsen
***Norðoya røktarheim kl. 14.30:*** Niels Pauli Danielsen
***Klakksvík kl. 11.00:*** Elsa Funding. Talvan gongur fyri sjómansmisjónina hjá kirkjuligu heimamisjónini
***Vágur:*** kl. 11.00,
***Hvalba:*** kl. 12.30, Jónsvein Bech

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti. Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18.00 Møti við Egil Joensen.

**Lívdin á Brekku 3**
Fríggjakvøldið kl. 20 ungdómsmøti Jens Wang talar.
***Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla***
kl. 10.30 Familjumøti har Símun Absalonsen talar um »Familjulív- Álop á hjúnabandið og familjuna«.
kl. 11.30 Samfelagsløta
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 er evnið »Venezuela« Ingvard Petersen talar.
Undir møtinum er barnaansing. Kl. 12 Sunnudagsskúlin.
Møtini sunnudag kunna hoyrast á netinum www.livdin.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Týskvøldið kl. 20.00 Bíbliutími, Matt. 20,17-20,34. Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Klæmint Tausen, Brynhild og Vivi syngja. Í november fer Steen Palmquist familjuráðgevi og psykoterapeutur at undirvísa tvey kvøld soleiðis: 6. nov. um at vera maður/kona í hjúnalagnum og 13. november um barnauppaling. Kvøldini byrja kl. 19.30 og enda uml. kl. 22.00. Tiltakið er ókeypis, men høvi verður at geva eina gávu til Agape. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20.00 verður Bíbliutími og bønarløta. Djóni Thomassen talar um Dániel, 3. partur.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti í Hebron vegna umbygging av Ebenezer.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti. Á møtinum talar Sverri Steintún.
Týsdagin 17. oktober byrjar BeTwix aftur. Betwix er ungdómstiltak fyri ung í aldrinum 5.-8. flokkur.

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 20.00 Sangvenjing, Ebenezerkórið - venja í Ebenezer.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Møti er í Hebron á Argjum - talari: Gunnar Nielsen.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti - dópur verður á møtinum - talari: Rólant í Skorini. www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15.00 Bøn. Andakt á Vallalíð kl. 19.00. Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið - fyri allar kvinnur.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti. Sunnudagsskúlin hevur heystfrí. Møti kl. 18.00 - Heimaforbundið skipar fyri. Innsetan av nýggjum leiðarum, drekkamuður aftaná. Øll eru vælkomin.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við Sunnudagsskúla, Theodor Petersen talar, kl. 18.00 Evangel. møti við Birgit og Niclas Thomsen.
*www.gospel.fo*

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Tímabøn, kl. 19.00 Delli.
Hósdagin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 19.00 Chill.
Fríggjadagin kl. 6.00 Morgunbøn.
Leygardagin kl. 21.00 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta, kl. 11.30 Barnagudstænasta. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.filadelfia.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin 10. okt. onki Várgleði í KFUK vegna heystferiu.
Ten-sing kórið venur ikki mikukvøldið 11. okt. í KFUM vegna heystferiu.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími.

**Filadelfia Vágar, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 undirvísing og bøn. Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Samkoman Kedron í Sørvági**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Uppbyggingarmøti við breyðbróting. Sunnudagsskúli verður fyri øll børn kl. 11.30. Evangel. møti verður kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Páll á Lakjuni talar. Evni: Hvør er sum Harri Gud okkara. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 16.00-17.30 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikukvøldið kl. 20.00 bíbliutími.

**Soli deo Gloria!**
Hóskvøld kl 20.00 ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl 18.00 møti, Jóni Jóhannesen talar.
Mánakvøldið kl. 20,00 bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið 11. okt. kl. 20.00: Bíbliutími, 1. Tim. 4. kap.
Hósdagin 12. okt. kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.
Hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Bønarmøti verður í kvøld kl. 20.00.
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 20.00 Møti við Viggo Vilhelmsen.
Fríggjadagin kl. 19.00 Møti í Samljóð við Viggo Vilhelmsen, Bill Justinussen syngur.
Leygardagin kl. 19.00 Møti í Samljóð við Viggo Vilhelmsen, Lisa Fredriksberg syngur.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti í Betania við Viggo Vilhelmsen. Kl. 19.00 Møti í Samljóð við Viggo Vilhelmsen, Heini Lützen syngur.



sansir.fo

## Verkætlanarfólk til KT menning

**Vit styrkja okkara kt-menningarøkið, og sóknast tí eftir starvsfólki.**

Saman við einum framfýsnum toymi verður tú við til at menna og røkja okkara tryggingarskipanir. Tú kemur at arbeiða nógv við verkætlanum, ið krevja innlit, samskipan og verkseting, og tí mást tú duga væl at samskifta.

Vit nýta tryggingarskipanina, TIA, sum er ein framkomin og altjóða skipan, ið verður nýtt í 40 tryggingarfeløgum í 18 londum kring um í heiminum. Aðrar skipanir, sum vit nýta til heimasíðu, intranet, tilgongdir og hagtøl, eru eisini natúrligur partur av menningarøkinum.

**Starvið**
Vit kunnu bjóða eitt starv, sum fevnir rættiliga breitt í einum spennandi og mennandi umhvørvi. Starvið inniheldur nógvar avbjóðingar, og tú fært møguleikan at ávirka gongdina í einum nýggjum og slóðbrótandi felagi.

Arbeiðsuppgávurnar fevna millum annað um kt-verkætlanir har samskipan, samskifti og íverksetan eru av stórum týdningi.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur, um tú hevur arbeitt við verkætlanum og hevur royndir við verkætlanarleiðslu.Tú hevur eina hóskandi kt-útbúgving ella viðkomandi royndir.

Persónliga ert tú fyrikomandi. Tú arbeiðir sjálvstøðugt og ert samstundis ein góður viðleikari. Tú dugir at gera tað torføra einfalt, tú hevur ábyrgdarkenslu og vilt veita eina góða tænastu.

**Setan, umsókn og freist**
Starvið verður sett sum skjótast og lønin verður ásett eftir avtalu í samsvari við royndir og førleika.

Umsóknir skulu verða okkum í hendi áðrenn 15. oktober 2006.

Send tína umsókn við lívsgongdarlýsing (CV) til:
Tryggingarfelagið Føroyar
att. Starvsfólkadeildin
Kongabrúgvin
Postboks 329, FO-110 Tórshavn

Umsóknin kann eisini sendast við telduposti til:
starvsfolkadeild@trygging.fo

Vilt tú vita meira um starvið, kunnu spurningar setast Óluvu Poulsen á telefon 215594 ella teldupost op@trygging.fo. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Postboks 329, 110 Tórshavn
Tel 345600, Fax 345601
tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

*Tryggingarfelagið Føroyar P/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn, og 5 deildir kring landið. Í felagnum starvast 118 fólk.*